


sang óført við. Sjálvur kennist eg ikki við hetta lag, men tað var eyðsæð, at DC Talk ikki eru farnir í gloymibókina, hóast teir ikki spæla saman longur.

Sangarin, Michael Tait, gjørdi eisini sína skyldu á aðrar mátar. Sum allir útlendskir tónleikarar sum koma til Føroya á vitjan, nýtti hann fleiri ferðir høvi til at vísa á at "This is just the most beautiful place in the world". Hann fór enntá so langt sum at siga, at hann mátti finna sær eini hús í Føroyum. Og hetta dámdi áhoyrarunum sera væl. "Would you mind having me as your neighbour?", og fólkið geylaði aftur: "Nooooo!". Michael Tait var ikki tann vanliga ímyndin av eini rokkstjørnu. Hann var sera dámligur og prátingarsamur, og ikki minst var hann eyðmjúkur og takksamur fyri at spæla her á klettunum.

### Tyngdarlógin sett til viks

Tait spældi eina sannførandi konsert. Konsertin vardi í ein góðan tíma, og hóast fólkið ikki kendist við øll løgini, so vóru tey alla tíð við uppá framførsluna. Aftaná seinasta lagið takkaðu teir fyri seg, og fóru av pallinum. Men fólkið vildi hava meir. Og tað fingu tey.

Teir komu út aftur og spældu eina alternativa, harða útseting av DC Talk klassikaranum "Jesus Freak", og nú var alt á gosið. Hetta var júst lagið, sum fólk høvdu bíða eftir, og nú tóktist tyngdarlógin fullkomiliga at missa tamarhaldi á teimum hoppandi áhoyrarunum. Feitt!

Tait var uttan iva tónlistarliga hæddarpunktið á Fjarðafestivalinum 2006.



# Sveimandi Sigrid

Sigrid Rasmussen telist millum tær allarbestu songkvinnur her á landið. Framførslan á Fjarðafestivalinum var sjón fyri søgn. Hennara rødd er klokkuklár, og hon bar framførsluna heilt væl. Hennara tónleikur var inniligur og sveimandi.

Saman við Gunnar Guttesen og Brandi Jacobsen hugtók hon okkum áhoyrarar við sínum vakra sangi. Tey framførdu friðarligan, inniligan tónleik. Kanska var tónleikurin í so friðarligur, tí tað gekk rúm tíð áðrenn fólkið leitaðu fram til pallin.

Fyri meg var hæddarpunktið ein sera vøkur útseting av kenda lagnum "Isn´t She Lovely" Heldur enn at spæla lagið soleiðis, sum Stevie Wonder plagar at spæla tað, høvdu Sigrid & Co. valt at taka lagið heilt niður í tempo. Her vísti Sigrid veruliga sínar dygdir, men eisini hennara pianistur, Gunnar Guttesen, skaraði framúr.

Sigrid er ein verulig "diva" á pallinum. Hon sær gott út, hon hevur tí røttu útstrálingina og hennara sanghättur hevur ein rættan altjóða dám.

Sum heild var hetta ein góð men stutt framførsla. Vegna drúgvar seinkingar, høvdu fyrireikararnir skorðið 10 minuttir av hennara skrá. Spell, men neyðugt!



# Grace løgdu fyri

Fyrstu framførsluna á Fjarðafestivalinum átti Grace. Grace er ein sangbólkur mannaður við 8 ungum fólkum úr Eysturoynni.

Seks ungir menn og tvær ungar kvinnur. Tey framførdu nakrar sálmar og nøkur meiri "barbershop" kend løg. Grace framførur kend løg, sum eru ílatin nýggjan og frískan ham. Hesum tóku áhoyrararnar eisini heilt væl ímóti.

Sum heild riggaði teirra framførsla væl, hóast tú onkuntíð hoyrdi, at hetta er ein nýggjur sangbólkur. Tey tóktust ikki alla tíð heilt trygg á pallinum. Kanska vóru ljóðviðurskiftini ikki optimal á pallinum, men úti í salinum ljóðaði heilt gott. Hetta var ein bleyt, góð byrjan uppá festivalin.